VIÐMERKINGAR

## Málið og teknsetingin í føroysku bløðunum

Kristin Poulsen

Tá ið tú lesur føroysku bløðini, í hvussu so er Dimmalætting og Sosialin, er tað harmiligt at síggja, hvussu illa nógv duga at skriva og at seta tekn. Hesi fólk stutt sagt ryggbróta vakra mál okkara, og tað mátti borið til at fingið onkran málkønan at hugt tekstin ígjøgnum, áðrenn hann kom alment á prent, tí sum nú er, er tað, sum skrivað verður, ofta ikki borðbart.

Hyggja vit at kommasetingini síðstu mánaðirnar, so er versnað so stórliga. Hyggja vit í blaðið, eg siti við í løtuni, kann eg taka nøkur dømi: **Klaksvíkingurin, Andrass Miðskarð**, hevur givið út skaldsøguna, Bygdarmenning. Komma skal ikki vera um Andrass Miðskarð, tí tað eru fleiri enn ein klaksvíkingur til. Klaksvíkingurin Andrass Miðskarð hoyrir tætt saman, og har skal tí onki komma vera. Tað skal heldur onki komma vera millum skaldsøguna og Bygdarmenning, tí tað er fleiri enn ein skaldsøga til, og **skaldsøguna Bygdarmenning** hoyrir tætt saman.

Aðrastaðni í blaðnum stendur: Nordafarbáturin, Bakkafossur, fekk ein dagin nógvan tosk. Tað skal ikki vera komma um orðið Bakkafossur, tí tað eru fleiri nordafarbátar, og Nordafarbáturin og Bakkafossur hoyra tætt saman.

Heilt øðrvísi er við setninginum: **Løgmaður, Anfinn Kallsberg, helt ólavsøkurøðuna í ár**. Tað er bara ein løgmaður, og tí seta vit komma um Anfinn Kallsberg. Vit vilja leggja afturat, hvussu hann eitur og seta tað fyri seg.

Vónandi hevur hetta hjartasuffið hjálpt. Tað er vælmeint.

## Stór mótasýning í KÍ-høllini

TÍÐINDASKRIV

Stórsligin mótasýning verður í KÍ - Høllini hóskvøldið 5. desembur klokkan 20.00.

Einir 10 til 12 handlar koma at luttaka. Hesir koma at sýna okkum alskins klæðir bæði til, tilkomin,vaksin,hálvvaksin, børn, og smábørn, somuleiðis vera ymisk hársnið á skránni.

Enn er ikki endaliga avgjørt hvørjir handlar koma at luttaka, men alt hetta verður kunngjørt í fjølmiðlunum í komandi viku.

Ikki tykkum at siga, so verður eisini okkurt leskiligt at fáa meðan sýnt verður fram.

Tað er Norðoya Kunningarstova saman við teim luttakandi sum skipa fyri tiltakinum.



## Fíggjarpolitiskur sjónleikur

Kristina Háfoss
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Tað má sigast at verða ein veruligur sjónleikur, ið hevur tikið seg upp á politiska leikpallinum eftir at fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 varð lagt fram í Løgtinginum. Heldur enn at geva uppskotinum eina sakliga viðgerð, er fíggjarlógaruppskotið endað sum ein leikpallur hjá andstøðuflokkunum og ikki minst hjá fíggjarnevndarformanninum at føra fram leikir, ið hóska júst til teirra leiklut. Hetta tryggjar ongan búskap - byggir onki land.

**Búskaparligt undur**
Beint ímóti øllum spádómum hava føroyingar megnað at reisa føroyska búskapin úr djúpari kreppu til í dag at hava ein sunnan og meira sjálvberandi búskap. Ein búskap við nógvari vælferð, stórari uppsparing, munandi minni skuld, breiðari inntøkugrundarlagi, lægri skattatrýsti, minni studningi, kappingarførum vinnulívi og betri sosialum býti.

Síðan 1998 hevur landskassin havt millum 400 og 700 mió. kr. í yvirskoti og nú ríkisstuðulin er minkaður við 366 mió. kr. verður yvirskotið í ár og komandi ár um 150 mió. kr. Sæð í mun til støddina av búskapinum má hetta sigast at verða eitt satt bragd. Tað eru fá lond í heiminum, ið kunnu vísa á líknandi hagtøl.

Men trøini vaksa ikki inn í himmalin. Týðilig tekin eru innanlands eins væl og uttanlanda, ið ávara um, at búskaparvøksturin fer at verða væl minni komandi árini. Hóast talan neyvan verður um nakra kreppu, so er neyðugt við varnum fíggjarpolitikki og skal landsins fíggjarlóg taka hædd fyri, at búskaparvøksturin komandi árini fer at liggja á einum væl lægri og meira natúrligum støði.

**Semja um at tálma útreiðsluvøkstri**
Fíggjarlógin er eisini grundað á varligar inntøkumetingar og er vøksturin í útreiðslunum minni enn undanfarnu árini. Men samgongan og meirilutin í fíggjarnevndini eru samd um, at rakstrarútreiðslur landsins skulu tálmast enn meira.

Samgongan er samd um tiltøk, ið merkja um 70-80 mió. kr. fyri fíggjarlógina - positiva vegin - men fíggjarnevndin metir, at tørvur er á enn fleiri útreiðslutálmandi tiltøkum og tí hevur verið semja um, at heita á landsstýrið um, at koma við uppskotum í hesum sambandi. Fíggjarnevndarumboðini hjá Tjóðveldisflokkinum hava víst á, at neyðugt verður við tiltøkum á 80 - 100 mió. kr., tvs. eitt vet meira enn samgongan er samd um.

**Neyðugt við skipaðum og málrættaðum tiltøkum**
Sum kunnugt er politikkur ein spurningur um raðfestingar, og tí er so altavgerandi, at verða sparingar framdar - ja, so skulu hesar gerast á rætta staði og neyðugt er, at talan verður um skipaði tiltøk, ið eru liður í størri politiskum máli og raðsfestingum.

Tí kann "salami-" ella "plenuklippara-"metodan, har skorið verður javn og har allar játtanir verða tær somu sum undanfarna ár - ikki nýtast. Hetta hevur onki við politikk at gera og ger meira skaða enn gagn. Neyðugt er hinvegin, at fremja tiltøk, ið merkja meira samskipan, rationaliseringar, útvaldar lógarbroytingar, færri studningsskipanir o.s.fr. Okkurt kann gerast áðrenn 1. januar 2003, meðan nógv kann gerast fram til 1. januar 2004.

Mest av øllum verður eisini neyðugt við endurskoðan og nýhugsan um, hvussu vit skipa okkara samfelag eitt nú á almanna-, heilsu- og útbúgvingarøkinum í framtíðini, men avkastið av hesum broytingum sæst ikki aftur eftir einum ári.

**Fíggjarnevndarformaður - rekur egin áhugamál**
Sætið sum fíggjarnevndarformaður hevur stóran týdning. Formaðurin umboðar vanliga fíggjarpolitisku áhugamálini hjá samgonguni og kundi verið talirør fyri samgongutinglimir. Men so er ikki við núverandi fíggjarnevndarformanni.

Heldur enn at virka fyri samstarvi við samgongutinglimir í fíggjarnevndini og landsstýrisfólk - ja, so gongur formaðurin í alt ov stóran mun egin og flokspolitisk ørindi. Endamálið tykist at verða at hevja seg og sínar landsstýrismenn og niðurgera landsstýrisfólk úr øðrum flokkum - serstakliga tá umræður landsstýrisfólk úr Tjóð-veldisflokkinum. Hetta hava vit týðiliga sæð í fjølmiðlunum seinastu vikurnar.

Skal fíggjarnevndin gera sítt arbeiði til lýtar, átti fíggjarnevndarformaðurin at virka fyri góðum samstarvi við landsstýrisfólkini. Tí fíggjarnevndin hevur hvørki nóg gott innlit ella umsiting til sjálv at gera stórvegis skipaðar broytingar í fíggjarlógaruppskotinum, og hevur tí tørv á samstarvi við landsstýrisfólk eins væl og við samgonguna sum heild. Tí skulu lógarbroytingar gerast, er neyðugt at allir 17 samgongutinglimir taka undir við hesum.

**- Fremur ikki álit og samstarv**
Somuleiðis er alt prátið hjá formanninum um, at ávísir landsstýrismenn hava nýtt meira enn aðrir fullkomiliga burturvið. Hetta skapar onki samstarv ella álit millum fíggjarnevndina og landsstýrið. Landsstýrið er ein eind, ið eigur at arbeiða til frama fyri teimum málum, ið tað hevur sett sær. Talan er ikki um 2, 3, 4 ella 9 landsstýri. Tí er tað ikki áhugavert hvat ein ávísur fær játtað í krónum og oyrum, men hvussu hesar krónur verða nýttar, hvussu raðfest verður og hvat sum heild fæst burturúr.

Men skal hyggjast at øking í rakstrarútreiðslunum seinastu árini - ja, so vísa veruligi tølini, at landsstýrismaður hjá fíggjarnevndarformanninum liggur á odda. Men hetta hevur minni týdning.

**- Í sjálvdrátti**
Í kjak-sendingini í SVF týskvøldið har fíggjarnevndarformaðurin og fíggjarmálaráðharrin luttóku, vórðu samgongu-fíggjarnevndarlimirnir týðiliga nýttir sum statistar í leikinum hjá fíggjarnevndarformanninum. Hetta er ein leikur, ið eg als ikki ætli at luttaka í.

Eg havi ongantíð tikið undir við tí leisti, ið fíggjarnevndarformaðurin hevur borðreitt fyri landsstýrisfólkum og øðrum. Fíggjarnevndarformaðurin vil varðveita allar játtanir óbroyttar í krónum og oyrum í mun til 2002, og harvið taka burtur allar tær øktu raðfestingarnar til eitt nú eldraøkið, serforsorgina, útbúgvingar- og granskingarøkið v.m. Somuleiðis vil hesin leistur - ið eitt nú ikki tekur hædd fyri lønarvøkstri - raka útbúgvingar, heilsu- og almannamál serliga hart. Hetta er als ikki í trá við politisku málini hjá samgonguni og fær ikki undirtøku frá samgongutinglimum. Tí bera boðini frá fíggjarnevndarformanninum sera nógv brá av sjónleiki, ið bert kann tæna ávísum endamáli, ið vit bert kunnu spáa um.

Sum nevnt omanfyri er tó full semja um, at tálma almenna útreiðsluvøksturin meira, men eg havi frá byrjan til enda lagt dent á, at neyðugt er við skipaðum og málrættaðum tiltøkum í samstarvi við landsstýrisfólkini. Men hetta hevur tíverri ikki verið at sæð aftur í útsøgnum hjá formanninum, tá hesin hevur sagt seg úttalað seg vegna meirilutan í nevndini. Tí henda grein.

**Hvat vil andstøðan ?**
Andstøðan hevur sum kunnugt eisini luttikið í fíggjarpolitiska sjónleikinum. Andstøðuflokkarnir hava ein rættiliga sjálvsagda leiklut sum kritikarar á politiska leikpallinum. Men best varð, um talan varð um konstruktivan kritik. Onkur er - men tílíkur er ikki nógvur av í føroyskum politikki. Sum víst á í undanfarnum greinum, so siga anstøðuflokkarnir seg vilja hava sjálvberandi búskap, men vilja ikki skerja ríkisveiting í bestu tíðum. Teir geva niðurskurðinum í ríkisstuðlinum skyldina fyri at tálmast skal fíggjarliga, hóast niðurskurðurin av ríkisstuðlinum bert merkti eitt minni yvirskot á fíggjarætlanini. Somuleiðis vísir andstøðan á, at ov nógvur peningur verður nýttur - men samstundis verður sagt, at ríkisveitingin ikki skuldi verið skorin tí hesin partur somuleiðis skuldi verið nýttur. Tá ið samgongan tosar um varðsemi og sparingar - ja, so er eisini hetta galið - men samstundis er eisini galið um samgongan ikki velur at spara. Ja, talan er sanniliga um sjónleik við nógvum leiklutum - eftir stendur spurningurin hvat andstøðuflokkarnir veruliga vilja fíggjarpolitiskt.

**Búskaparlig ferð ímóti málum**
Føroyska samfelagið er altíð á ferð. Í løtuni gongur ferðin ímóti einum sveiggi, og trupult er at síggja hvussu líkindini eru hinumegin. Hóast vit hava eitt trygt akfar er greitt, at verður ferðin ikki sett niður áðrenn komið verður til sveiggið, so kann samfelagið koma í trupulleikar og neyðugt kann verða at steðga. Verður ferðin hinvegin sett niður nú í góðari tíð, kann samfelagið nærum ótarnað halda á við ferð síni ímóti fleiri og størri málum. Vónandi fer ongin sjónleikur at forða hesi ætlan.



# Malan lyftir tunga arvin




*Hon var einsamøll við fýra børnum og hevði ikki nóg mikið við einari inntøku. Tí fór hon undir at týða stórverkið »Harry Potter og eldbikarið« eftir heimsgitnu J.K. Rowling*
*Mynd Jens K. Vang*

**Hon hevur brúkt 10 mánaðir til at týða knappliga 600 enskar síður til føroyskt. Tað hevur verið strævið og krevjandi, men eisini spennandi og mennandi. Vit hava prátað við Maluna Háberg, sum hevur yvirtikið leiklutin at týða tann vælumtókta Harry Potter til føroyskt**

HARRY POTTER
*Ingi Rasmussen*

Ein ótrúliga góð kensla.

Soleiðis sigur Malan Háberg, nú hon loksins kann taka føroysku bókina »Harry Potter og Eldbikarið« í hondina. Og kenslan hevði ikki verið nógv betri, um hon hevði skrivað bókina sjálv, heldur hon.

Malan er bæði fegin og lætnað, nú hon er liðug við týðingina, sum hon hevur sitið við síðstu 10 mánaðirnar.

– Hetta hevur verið ótrúliga strævið, men samstundis bæði mennandi og spennandi. Tíbetur havi eg fingið góða hjálp, og nú eri eg øgiliga spent at síggja, hvussu hon verður móttikin, sigur Malan.

Arvurin at týða heimskenda Potter, sum hevur sligið øll sølumet, er tungur at lyfta. Hóast hetta er fjórða bókin á føroyskum í røðini um heimskenda gandakallin, so er hetta fyrsta bókin, ið Malan hevur umsett. Hinar bøkurnar hevur Gunnar Hoydal føroyskað.

### Góð hjálp

Malan er 41 ára gomul og lærari á Venjingarskúlanum. Nú hon hevur tikið yvir, hevur Gunnar Hoydal verið henni ein hollur stuðul.

– Stílurin hjá mær og Gunnari Hoydal er ógvuliga ymiskur, so fólk skulu endiliga ikki vænta, at bøkurnar vera eins, men hann hevur verið ógvuliga hjálpsamur við rættlestri. Gunnar hevur lisið alt ígjøgnum og hevur mangan loftað mær. Hann hevur eisini hjálpt mær at halda skil á øllum heitunum, sum hann jú hevur gjørt, sigur Malan. Bókin er týdd beinleiðis úr enskum. Ávegis hava verið fleiri avbjóðingar, eitt nú tí enskt er eitt navnorðamál, meðan føroyskt er eitt sagnorðamál. Ta felluna datt hon mangan í, men slapp burturúr henni aftur við góðari hjálp frá Gunnari.

Ein onnur góð hjálp, sum hon hevur havt í arbeiðnum er komin frá 11 ára gamla Kristjan Gásadal. Hann hevur lisið allar hinar bøkurnar, og hann hevur lisið umsetingina hjá Maluni so hvørt.

– Kristjan tók væl undir við bókini og hevur verið heilt ótrúligur. Tað hevur havt stóran týdning fyri meg, at eitt barn las bókina og segði sína meining, tí bókin er fyrst og fremst skrivað til børn, sum hugsa øðrvísi enn vit vaksnu, sigur Malan.

### Líkar lagnur

Nú heimsgitna J.K. Rowling var fátøk, fráskild og búði einsamøll við dóttur sínari, tá hon fór undir at skriva fyrstu bókina á einari kafé, meðan dóttirin fekk sær ein blund í barnavogninum.

Byrjanin til Potter-ævintýrið hjá Malan Háberg, sum hevur fýra børn í aldrinum 5, 8, 13 og 15 ár, er kanska ikki heilt ólík.

– Eg var nýliga fráskild og skuldi finna meg til rættist við fýra børnum. Eg hevði ikki nóg mikið við einari inntøku og hevði ikki hug at fara út at vaska um kvøldarnar, tí eg vildi gera okkurt, sum eg kundi arbeiða við heima og eisini hevði áhuga fyri, sigur hon.

Malan hevði áður umsett fyri SvF og ringdi tí til Bókadeild Føroya Lærarafelags og spurdi, um tey høvdu eina barnabók ella okkurt annað, sum skuldi týðast.

– Eg fekk at vita, at teimum tørvaði ein týðara til Harry Potter, tí Gunnar Hoydal ikki hevði stundir, og tey spurdu, um eg tordi undir uppgávuna. Eg setti nakrar treytir, sum eg fekk uppfyltar, og fór við góðum treysti undir uppgávuna, sigur Malan.

### Sera krevjandi

Tað vísti seg at verða sera krevjandi, og onkuntíð hevur hon havt hug at kasta frá sær. Eftirhondini fylti týðingin so nógv, at kvøldini gerandisdagar, vikuskiftini og mest sum øll frítíð fór framman fyri telduskíggjan. Men nú úrslitið liggur á borðinum, angrar hon ikki, at hon tók uppgávuna á seg.

– Tað truplasta hevur verið, at eg onkuntíð havi kent á mær, at eg ikki havi røkt aðrar uppgávur bæði í skúlanum og heima nóg væl. Børnini hava verið ótrúliga tolin, og tey skulu hava eina stóra tøkk fyri tað. Tey hava glett seg, til tað fekk ein enda, so tað var ein lætti at fáa bókina lidna, so vit øll kundu fara í Burger King, sigur Malan.

### Kanska meira

Sjálv er Malan Háberg bergtikin av skriviháttinum hjá J.K. Rowling.

– Hon hevur eitt fantastiskt hugflog. Sjálv havi eg mangan siti í skellilátri, og hóast bókin er skrivað til børn, so haldi eg, at vaksin fáa nógv burturúr at lesa bøkurnar, sigur hon.

Rithøvundurin hevur boðað frá, at sjey bøkur skulu skrivast í røðini um Harry Potter. Sostatt skulu tríggjar afturat týðast til føroyskt. Spurningurin er so, um tað aftur verður Malan Háberg, ið átekur sær tær uppgávurnar.

– Tað dugi eg ikki at svara. Fimta bókin er ikki komin enn, so kanska síggi eg ljósari upp á tað heila til ta tíð. Tað veldst um umstøðurnar, tí tað er ríkiligt til eitt heiltíðarstarv at týða so stórar bøkur innan fyri so avmarkaða tíð, sigur Malan Háberg.